Fra: Majbritt Lamhauge <Majbrittl@vorn.fo>
Sendt: 12. januar 2026 13:35
Til: Katrina Michelsen <katrina@fisk.fo>
Cc: Betzy Ludvig <Betzy.Ludvig@fisk.fo>
Emne: VS: Hoyringarsvar: Broytingar í sjófeingislógini

Tilfeingis- og vinnumálaráðið
Att.: Betzy Ludvig, løgfrøðingur

Víst verður til hoyringarsvar okkara í teldubrævi niðanfyri.

Vørn skal við hesum loyva sær at koma við hesi ískoytisviðmerking, frámerkt við gulum:

Til 34, stk. 2, nr. 3:
Vørn tekur ikki undir við ásetingini um "nær Fiskiveiðieftirlitið kann áseta treytir".
Endamálið er júst at Vørn skal kunna áseta treytirnar til innviging, veita góðkenning og kunna seta treytir fyri at goyma upplýsingar o.a.

Í hesum sambandi metir Vørn at Tilfeingis- og vinnumálaráðið kundi umhugsa at sett nýggja heimild at seta krav um vakmyndatól umborð á fiskiskip, evt í § 34, stk. 2, nr. 5. Treyt um vakmyndatól er longu ásett fyri føroysk fiskiskip í bretskum sjógiv, í sínaámillum fiskiveiðiaftaluni millum Føroyar og Bretland, og verður væntandi eisini krav frá øðrum londum í komandi tíðum.

Somuleiðis metir Vørn, at lógarheimild eigur at verða staðfest til, at Vørn kann krevja útflýggjan og nýtslu av videotilfari, sum er latið øðrum myndugleikum í sambandi við eftirlit ella fiskiveiðu, ið fer fram við føroyskum loyvi.

Vinarliga / Best Regards
Majbritt Lamhauge
Løgfrøðingur / Legal Adviser

Faroe Islands Fisheries Inspection
Tlf.: +298 291011
mailto:majbrittl@vorn.fo

Fra: Majbritt Lamhauge
Sendt: 9. januar 2026 14:13
Til: Katrina Michelsen <katrina@fisk.fo>
Cc: Betzy Ludvig <betzy.ludvig@fisk.fo>; Journal <Journal@vorn.fo>
Emne: Hoyringarsvar: Broytingar í sjófeingislógini

Tilfeingis- og vinnumálaráðið
Att: Betzy Ludvig, løgfrøðingur

Víst veður til teldubræv tykkara, dagfest 19. november 2025, har hoyring um broytingar í sjófeingislógini varð send Vørn. Halt okkum tilgóðar at farið er um ásettu hoyringarfreistina.

Vørn hevur fylgjandi viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar, umframt nakrar viðmerkingar til ítøkiligar broytingar sum Vørn mælir til verða gjørdar í lógini, nú lógin lutvíst verður endurskoðað.

Til § 7:
Vørn metir tað verða óheppið um frágreiðing um virksemi hjá stovninum ikki verður latin Løgtinginum á hvørjum ári.
Hóast tað sum so ikki henda so nógvar broytingar í sjálvari fiskivinnuni og fiskivinnulóggávni, stendur Vørn áhaldandi fyri stórum avbjóðingum, sum gerast meira eyðsýndar nærum dag fyri dag.
Serliga eru tað avbjóðingar viðvíkjandi skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum sum eru gomul og í stóran mun ótiðarhóskandi, trupul at umvæla og dýr í rakstri. Tjaldrið verður 50 ár í ár og Brimil er farin um tey 25 árini, og aldurin setir síni spor, sum viðføra, at skipini hava fleiri og fleiri liggidagar vegna umvælingar, brek og viðlíkahald, og verður hetta ein trupulleiki sum bara stendur við og versnar. Tað kann ikki umgangast at tað fær ávirkan á alt virksemið sum skipini eru partur av, herundir tilbúgving, fiskiveiðieftirlit í føroyskum sjóøki og skyldur sum Føroyar hava mótvegis altjóða fiskiveiðifelagsskapum sum t.d. NEAFC og NAFO.
Týdningurin av, støðugt og áhaldandi at gera politisku skipanina varuga við hesar avbjóðingar, skal ikki undirmetast, og Vørn mælir tí staðiliga frá at broyta hesa áseting, so Løgtingið á hvørjum ári fær viðkomandi kunning um – í hvussu er - støðuna á Vørn/Fiskiveiðieftirlitinum.

Til § 22, stk. 1:
Vørn hevur onga viðmerking til hesa broyting.

Til § 26:
Vørn ivast í um tað er samsvar millum heimildina í sjófeingislógini viðvíkjandi allýsingini av "føroyskum sjógvi" (200 fj.), og allýsingini sum ásett í altjóða lóggávu (3 fj.).
Vørn er sostatt m.a. í iva, um tað yvirhøvur er heimild fyri at sýta fyri bunkring, tænastuveitingum o.ø. uttanfyri 3 fj.

Í hesum sambandi skal Vørn eisini heita á Tilfeingis- og vinnumálaráðið um at lata stovninum nýggj delegatiónsskriv, so ongin ivi er um hvørjar heimildi eru langdar til Vørn.

Til § 31a:
Vørn metir at skipanin við felagskvotu virkar væl. Ongin brúksskylda er á felagsrættindum og tí er vandi fyri at reiðarar sum ikki aktivt reka vinnuligan fiskiskap, aftur verða aktuellir í føroysku fiskivinnuni.
Undir øllum umstøðum metir Vørn, at nærri lógartekstur má ásetast áðrenn heimildin kann umsitast av Vørn. Ivi er m.a. um hvussu ein avhending av einum "rætti" til at luttaka í einum ávísum fiskiskapi skal kunna skrásetast, tá tað sum nú er, bara eru ítøkiligir dagar og kvotur sum kunnu avhendast.

Til 34, stk. 2, 1;
Vørn hevur onga viðmerking til hesa broyting.

Til 34, stk. 2, nr. 3:
Vørn tekur ikki undir við ásetingini um "nær Fiskiveiðieftirlitið kann áseta treytir".
Endamálið er júst at Vørn skal kunna áseta treytirnar til innviging, veita góðkenning og kunna seta treytir fyri at goyma upplýsingar o.a.

Í hesum sambandi metir Vørn at Tilfeingis- og vinnumálaráðið kundi umhugsa at sett nýggja heimild at seta krav um vakmyndatól umborð á fiskiskip, evt í § 34, stk. 2, nr. 5. Treyt um vakmyndatól er longu ásett fyri føroysk fiskiskip í bretskum sjógiv, í sínaámillum fiskiveiðiaftaluni millum Føroyar og Bretland, og verður væntandi eisini krav frá øðrum londum í komandi tíðum.

Til 34, stk. 2 nr. 6:
Vørn hevur onga viðmerking til hesa broyting.

Til § 37:
Vørn tekur undir við nýggju orðingini.

Til § 41a:
Broytingin fer at verða nakað meira umsitingarliga tung fyri Vørn, men annars hevur Vørn onga viðmerking til broytingina.

Til § 41 og § 41a, stk. 1:
Mett verður at avreiðing eigur at verða strikað í hesum ásetingum. Orðið er óviðkomandi ti ásetingarnar snúgva seg einans um landing.

Til § 52a:
Útskrivan av fiskiloyvum er útdelegerað til Vørn, ikki til Fiskiveiðieftirlitið og tí skal Vørn standa í ásetingini.

Eykað viðmerking:
Vørn metir at neyðugt er at sjófeingislógin hevur eina allýsing av nær talan er um eitt fiskiskip í sambandi við vinnuligan fiskiskap, í § 2, umframt at allýsingin av nær talan er um vinnuligt virksemi, eigur at verða víðkað og nágreinað.

Alt ov ofta er tað orsøk til ivamál og ósemjur, og hartil óneyðuga fyrisitingarliga krevjandi, at fiskivinnulóggávan ikki hevur eina allýsing av nær talan er um eitt fiskiskip.
Vørn metir at aktørar hava lyndi til at brúka vantandi allýsingina til at máa støðið undan t.d. veiðiloyvisskipanini, so hon missir sítt endamál.

Vinarliga / Best Regards
Majbritt Lamhauge
Løgfrøðingur / Legal Adviser

Faroe Islands Fisheries Inspection
Tlf.: +298 291011
mailto:majbrittl@vorn.fo